# UMSETILIG FISKIRÆTTINDI

Frágreiðing
til landsstýrismannin
í fiskivinnumálum

Tórshavn, 8. februar 2010

# INNIHALD

1. Inngangur ..... 5

2. Samandráttur og niðurstøður ..... 6

3. Umsetilig fiskirættindi – eitt sindur um grundsjónarmiðini ..... 8

4. Umseting av fiskirættindum í verandi skipan ..... 10

4.1. Yvirlit yvir umseting av fiskirættindum ..... 10

4.2 Umseting av veiðiloyvum ..... 10

4.3 Avhendingar av fiskidøgum ..... 13

4.4 Avhendingar av eginkvotum ..... 14

4.5 Søla av fiskiførum og eigaraskifti ..... 14

5. Umsetiligheitin í verandi skipan – nakrar metingar ..... 16

6. Uppskot um broytingar ..... 19

6.1 Fyritreytirnar ..... 19

6.2 Uppskot um broytingar ..... 19

# 1. INNGANGUR

### Bakgrund

Í samgonguskjalinum frá september 2008 verður boðað frá, at spurningurin um brúksskyldu og umsetiligheit av fiskidøgum[1] skal viðgerast.

Í tí sambandi hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum tikið stig til eina verkætlan at viðgera brúksskyldu og umsetiligheit av fiskirættindunum.

Endamálið við arbeiðinum er at skriva eina frágreiðing, sum kann vera grundarlag undir politiskari viðgerð og orðaskifti. Frágreiðingin skal lýsa og greina hugtøkini ”brúksskyldu” og “umsetiligheit” í síni heild, og við serligum atliti at endamálsorðingunum í lógini um vinnuligan fiskiskap og ætlanum landsstýrisins í samgonguskjalinum.

Hendan frágreiðing er ein partur at hesum arbeiði og viðger umsetiligheit.

### Arbeiðssetningur

Landsstýrismaðurin hevur orðað hendan ítøkiliga arbeiðssetning til spurningin um umsetiligheit.

”Frágreiðing verður skrivað, sum kann nýtast sum grundarlag undir politiskari viðgerð av spurninginum um umsetiligheit. Frágreiðingin skal

i) lýsa hugtakið umsetiligheit við atliti at m.a. endamáli, fyrimunum og vansum,

ii) lýsa, hvussu umsetiligheit virkar innan verandi karmar í lógarverkinum

iii) meta, um tørvur er á at broyta verandi karmar fyri ”umsetiligheit” til tess at røkka yvirskipaðu endamálunum í lógini um vinnuligan fiskiskap og ætlanum landsstýrisins í samgonguskjalinum, og koma við ítøkiligum uppskotum um, hvussu hetta kann gerast.”

### Skipan av arbeiðinum

Jens Helgi Toftum, fiskivinnufrøðingur, og Rúna F. Guttesen, løgfrøðingur, hava staðið fyri arbeiðnum.

[1] Jacob Vestergaard hevur boðað frá, at arbeiðið skal fevna um øll fiskirættindi, ikki bert fiskidagar

# 2. SAMANDRÁTTUR OG NIÐURSTØÐUR

Í lógini um vinnuligan fiskiskap er eitt av endamálunum, at tilfeingið skal gagnnýtast búskaparliga burðardygt fyri at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni.

Samgongan hevur sett sær fyri, at allar tilfeingisvinnur skulu vera lívfrøðiliga, fíggjarliga- og umhvørvisliga burðardyggar og geva størst møguligt búskaparligt avkast.

Skal búskaparliga málið í lógini og ætlanir landsstýrisins røkkast, og skipanir við umsetiligum fiskirættindum vera eitt amboð, er tørvur á at broyta verandi karmar fyri umsetiligheit.

Ætlanin við skipanum, har rætturin at fiska kann handlast, er at birta undir at tillaga bygnaðin í flotanum til búskaparliga burðardygga fiskiveiðu. Marknaðarmekanisman skal tryggja, at teir skipaeigarar, sum duga best at reka skipini og hava atgongd til kapital, vilja keypa fiskirættindini frá teimum, ið fáa minni úrtøku úr sínum fiskirættindum.

Fiskirættindi kunnu skifta hendur, við at veiðiloyvi verða løgd saman og fiskidagar/kvotur verða umsettar. Hesar flytingar eru reguleraðar í lóggávuni. Harumframt verða fiskirættindi flutt, tá skip verða seld við loyvum, ella felag, ið eigur fiskiskip, kann fáa nýggjan eigaraskara.

Føroyska lógarverkið loyvir ikki fríari umsetiligheit. Avmarkingarnar eru flestar í tí partinum av flotanum, ið er undir fiskidagaskipan í føroyskum sjógvi. Fyri fiskirættindi aðrastaðni er umsetiligheitin rúmari, og lógarásettu avmarkingarnar fáar.

Í fiskidagaskipanini ber ikki til at leggja veiðiloyvi saman ella at avhenda fiskidagar millum bólkar av fiskiførum og veiðihættir. Tað ber heldur ikki til at avhenda fiskidagar, um tú sjálvur ikki hevur brúkt minst 60 prosent av døgunum í undanfarna fiskiári.

Skal búskaparliga endamálið í lógini og ætlanir landsstýrisins um, at fiskiveiðan skal geva størst møguligt búskaparligt avkast røkkast við umsetiligheit, er tørvur á at broyta lógarverkið, so at umsetiligheitin verður smidligari og fríari.

Skotið verður upp at gera hesar broytingar í lógarverkinum (í tilvildarligari røð).

- Orðingin í endamálsgreinini í lógini um vinnuligan fiskiskap um, at umsitingin av lógini skal tryggja støðugar arbeiðsmøguleikar og virksemi um alt landið verður strikað. Tað er ikki uppgávan hjá høvuðsvinnuni at skapa arbeiðspláss og spjaða virksemi um alt landið. Slíkar orðingar í lóggávuni eru í andsøgn við eina fría tillaging í vinnuni og optimala gagnnýtslu av veiðiorkuni.

- Fiskiflotin í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi er við lóg býttur upp í bólkar. Hetta býtið stavar frá, tá fiskidagaskipanin var gjørd, og varð gjørt eftir, hvussu flotin tá var samansettur. Møguleikarnir fyri at flyta fiskirættindi millum bólkarnar eru avmarkaðir. Búskaparliga sæð læsir lógarásetta bólkabýtið og avmarkingarnar í

møguleikunum at flyta rættindi millum bólkarnar bygnaðin í flotanum, og forðar fyri skynsamari og fríari tillaging í flotanum. Bólkabýtið var kanska skilagott og hóskandi fyrst í 1990-unum, men nýtist ikki at vera tað í dag. Tí eigur at metast, um tørvur er á at endurskoða bólkabýtið í dagaskipanini.

- Kravið, um at tú sjálvur hevur brúkt 60 prosent av tillutaðum fiskidøgum fiskiárið frammanundan, fyri at kunna avhenda fiskidagar, forðar fyri tillagingum. Tí verður skotið upp, at 60% reglan verður strikað. Samstundis verður ein brúksskylda ásett soleiðis, at um loyvishavari sjálvur ikki hevur brúkt tillutaðar fiskidagar í t.d. tvey ár, missir hann fiskiloyvið ella partar av fiskidagatalinum. Við hesum verður framhaldandi forðað fyri, at feløg ella einstaklingar fáa útskrivað fiskiloyvi ár um ár, bert fyri at selja fiskidagar.

- Verandi regluverk loyvir samanlegging av veiðiloyvum, umframt avhending av egnum fiskidøgum og eginkvotum. Skotið verður upp, at fiskiloyvi, ið geva rætt til at fiska av t.d. felagskvotu og felags fiskidøgum, eisini kunnu avhendast. Hetta vil geva vinnuni betri møguleikar at tillaga virksemið, og kann verða við til at skunda undir lønsemið og tillagingar í flotanum.

- Skotið verður upp at seta í lógina, at kravið fyri at flyta veiðiloyvi hjá fiskiførum í fiskidagaskipanini er, at fiskiloyvi/fiskidagar eru knýtt at veiðiloyvinum, og at tað í fiskidagaskipanini ikki skal bera til at hava fiskifar við ”tómum” veiðiloyvi. Tá skip verða tømd ella nærum tømd fyri fiskidagar, dettur veiðiloyvið eisini burtur.

- Reglurnar um flyting og samanlegging av veiðiloyvum eiga at vera smidligari. Tí verður skotið upp, at tað skal bera til at klúgva eitt veiðiloyvi hjá fiskifari í fiskidagaskipanini, og at býta fiskidagarnar millum tvey skip. Eisini skal í sambandi við útskifting av skipum vera loyvt at flyta t.d. trý veiðiloyvi yvir á tvey skip. Smidligari reglur fyri at kasta veiðiloyvi saman geva skipaeigarum betri møguleikar at betra um vinnugrundarlagið, eins og bygnaðurin í flotanum verður tillagaður.

# 3. UMSETILIG FISKIRÆTTINDI – EITT SINDUR UM GRUNDSJÓNARMIÐINI

Umsetiligheit snýr seg um í hvønn mun rætturin at fiska kann umsetast, t.e. hvussu frítt rættindini kunnu verða avhendað, leigað ella seld øðrum, og at móttakarin fær ræði yvir rættindunum í styttri tíðarskeið ella endaliga.

Fiskirættindi kunnu skifta hendur við at loyvi, kvotur ella fiskidagar verða flutt, seld, avhendað ella leigað. Harafturat kunnu skip við loyvi verða seld, og feløg, ið eiga fiskiskip, kunnu fáa nýggjan eigaraskara.

Tey, ið mæla til umsetilig fiskirættindi, leggja dent á, at tá fiskirættindi kunnu keypast og seljast, fáa vit eina reguleringsskipan, ið birtir undir tillaging og búskaparligan effektivitet í vinnuni sæð undir einum.

Marknaðarmekanisman skal tryggja, at teir skipaeigarar, sum duga best at reka skipini og hava atgongd til kapital, vilja keypa rættindini frá teimum, ið fáa minni úrtøku úr sínum rættindum. Við hesum verður tilfeingið (kapitalur og arbeiðsmegi) nýtt á búskaparliga skynsamasta hátt. Kostnaðurin av at fáa fiskin úr sjónum minkar, veiða pr. eind verður størri, og vit fáa eina optimala samanseting av flotanum.

Eitt annað, sum oftani verður ført fram sum ein fyrimunur, er, at umsetilig fiskirættindi hoyra til tann partin av veiðireguleringum, har nógvar avgerðir, sum hava týdning fyri úrslit og býti, liggja hjá vinnuni sjálvari. Skipanin leggur í stóran mun upp til miðspjadda stýring, leys av politiskari smálutastýring.

Undir skipanum við umsetiligum rættindum er fremsta uppgávan hjá myndugleikanum at røkja fiskastovnarnar við at áseta mest loyvdu veiðu, fiskidagatal, økisfriðingar, reglur um reiðskap o.a., umframt at seta reglur fyri umseting av fiskirættindum.

Skipanir við umsetiligum fiskirættindum hava nógvar búskaparligar fyrimunir. Men flestustaðni er umsetiligheitin eitt eymt politisk mál, sum nógv kjak stendst av. Hetta hevur m.a. við politiskar hugsjónir og álit á marknaðarkreftirnar sum stýringsamboð at gera. Tey, ið leggja dent á vansarnar við umsetiligheit, vísa oftani til royndirnar úr teimum londum, sum hava handilskvotur (individual tranferable quotas, ITQ), og sum loyva lutfalsliga fríari umsetiligheit – eitt nú Ísland og New Zealand.

Við umsetiligheit slepst ikki undan bygnaðarligum broytingum, t.d. at fiskirættindi verða savnað í ávísum vinnufeløgum ella í ávísum støðum í landinum. Hendan gongdin nýtist tó ikki at vera ein eginleiki við umsetiligheitini sum so, men kann eisini vera ein avleiðing av tøkniligu menningini og gongdini í vinnulívinum yvirhøvur.

Ein annar vansi er, at kapitalisering av fiskirættindum kann gera tað fíggjarliga tungt hjá ungum fólki, ið vilja royna seg í vinnuni, at sleppa framat, tí neyðugt er at leggja sera stórar upphæddir á borðið, til tess at keypa fiskirættindi. Íløgan og skuldarbyrðan gerst ikki minni, tá tað bert er møguligt at útvega sær fiskirættindi í stórum bitum. Sama er galdandi, tá gildistíðin á fiskiloyvunum er long, og harvið tíðarhorisonturin fyri íløguna í fiskirættindini langur.

Fá lond hava heilt fría umsetiligheit av fiskirættindum. Avmarkingar eru gjørdar t.d. fyri at verja útróðrarflotan, antin við at umsetiligheitin ikki fevnir um fiskirættindi í útróðrarflotanum, ella at fiskirættindi ikki kunnu flytast frá útróðrarflotanum til størri fiskifør. Harafturat hava nógv lond hámark fyri, hvussu stóran part av fiskirættindunum einstaklingar ella feløg kunnu hava ræðið yvir.

### Fyrimunir og vansar við umsetiligum fiskirættindum

***Fyrimunir***

- Kostnaðurin av at fáa fiskin úr sjónum minkar við tað, at teir skipaeigarar, sum duga best at reka skip og hava atgongd til fígging, umsita veiðirættindini.
- Samansetingin av flotanum verður optimalari við tað, at líkindi eru fyri, at fiskiflotin og veiðiorkan verður tillagað veiði- og inntøkumøguleikunum.
- Størri veiða pr. eind, tí talið av fiskiførum verður minni.
- Av tí at roknast kann við, at vinnan fer at kasta meira av sær í eini skipan, har fiskimøguleikar kunnu keypast og seljast, verður grundarlagið undir nýíløgum í veiðitól betri. Nýggjari fiskifør hava vanliga betri fysiskar arbeiðsumstøður umborð, og hetta hevur týdning fyri trivnaðin, sum aftur hevur týdning fyri kappingarstøðuna hjá fiskiflotanum á arbeiðsmarknaðinum.
- Smidlig skipan, sum gevur fiskiflotanum betri møguleikar at tillaga seg til broyttar umstøður.
- Ein skipan við umsetiligum fiskirættindum ber í sær, at nógvar avgerðir, sum hava týdning fyri úrslit og býti í vinnuni, verða latnar sjálvari vinnuni. Skipanin leggur upp til eina miðspjadda stýring, har marknaðarmekanisman ræður, sum eitt alternativ til miðsavnaða politiska smálutastýring.

***Vansar***

- Fiskirættindi kunnu miðsavnast til ávís vinnufeløg ella ávís støð í landinum.
- Kann verða fíggjarliga tungt hjá ungum fólki, ið vilja royna seg í vinnuni, at sleppa framat, tí neyðugt er at leggja sera stórar upphæddir á borðið, til tess at keypa fiskirættindi.
- Høgir prísir á veiðirættindum kunnu føra við sær, at skuldarbyrðan hjá skipaeigarum, sum hava keypt sær rættindi, verður tung at bera.
- Grundað á royndirnar aðrastaðni, kann fríur handil við fiskirættindum føra við sær, at bygnaðurin í fiskiflotanum verður broyttur soleiðis, at eindirnar verða færri og størri. Hetta kann skunda undir gongdina, har arbeiðsplássini í fiskiflotanum gerast færri.

# 4. UMSETING AV FISKIRÆTTINDUM Í VERANDI SKIPAN

## 4.1. Yvirlit yvir umseting av fiskirættindum

Síðani vit fingu lógina um vinnuligan fiskiskap í 1994 eru reglurnar fyri umseting av fiskirættindum broyttar fleiri ferðir. Skiftandi politiskar samgongur hava skert ella víðkað møguleikarnar fyri at umseta fiskirættindi.

Lógin hevur tó ongantíð loyvt heilt fríari umsetiligheit. Í verandi skipan eru t.d. rættiliga nógvar avmarkingar fyri at leggja veiðiloyvi saman og at avhenda fiskidagar millum bólkar og veiðihættir í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi. Harafturat ger 60%-reglan, at tað ikki ber til at avhenda fiskidagar, um tú ikki sjálvur hevur brúkt minst 60 prosent av døgunum ella kvotuni fiskiárið frammanundan.

Ein onnur áseting, sum avmarkar umsetiligheitina, eru reglurnar, sum seta hámark fyri, hvussu stóran part av fiskirættindunum persónar kunnu hava ræðið yvir.

Lógarverkið ásetir treytir fyri at leggja saman veiðiloyvi og at avhenda fiskidagar og kvotur. Hinvegin eru ongar beinleiðis ásetingar, tá fiskirættindi skifta hendur, við at skip við loyvum verða seld, ella felag, ið eigur fiskiskip, fær nýggjan eigaraskara.

Í talvu 1 er yvirlit yvir, hvussu fiskirættindi kunnu skifta hendur, hvat er beinleiðis regulerað í lógarverkinum, og hvønn leiklut tað almenna hevur, tá fiskirættindi verða flutt.

Á næstu síðunum er størsti dentur lagdur á at lýsa tann partin av umsetingini av rættindum, sum er beinleiðis reguleraður í lógini um vinnuligan fiskiskap – t.e. samanlegging av veiðiloyvum og avhendingar av fiskidøgum/kvotum.

## 4.2 Umseting av veiðiloyvum

Tá veiðiloyvi verða umsett, verður sjálvt veiðiloyvið hjá skipinum og øll fiskiloyvi, sum skipið hevur, flutt øðrum. Fiskifarið, ið rættindini verða flutt frá, missir øll rættindi til vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi.

**Veiðiloyvi**
Veiðiloyvi er góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar

Reglurnar um samanlegging av veiðiloyvum komu inn í lógina í 1998. Ta fyrstu tíðina bar bæði til at leggja tvey veiðiloyvi saman til eitt, og at flyta tvey ella fleiri loyvi yvir á skip við ongum veiðiloyvi.

Hetta verður broytt í 1999, so at í mesta lagi tvey veiðiloyvi kunnu flytast. Samstundis verður 40-tons-skott sett í fyri samanlegging av veiðiloyvum. Hetta er galdandi til 2002, tá 40-tons-skottið verður tikið burtur. Í 2005 verður 110 tons skottið sett í.

**Talva 1: Umseting og flyting av fiskirættindum**

| Umseting | Grundarlag | Avmarkingar | Leikluturin hjá tí almenna |
|---|---|---|---|
| Veiðiloyvi kann verða lagt saman við veiðiloyvinum hjá øðrum fiskifari. | § 8, stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap<br>K. nr. 75 frá 13.06.06 um áseting av fiskiorku og mannagongd, tá veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør 15 tons og størri. | Fiskiorkan skal ikki gerast størri. Loyvt er ikki at flyta veiðiloyvi millum høvuðsbólkarnar, ásettir sambært § 28 í lóg um vinnuligan fiskiskap. | Tryggja, at høvuðsreglan um, at fiskiorkan ikki gerst størri, verður hildin. |
| Tvey veiðiloyvi kunnu verða flutt á fiskifar við ongum veiðiloyvi. | § 8, stk. 3 í lógini um vinnuligan fiskiskap, kunngerð nr. 75 frá 13.06.06 um áseting av fiskiorku og mannagongd, tá veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør 15 tons og størri. | Fiskiorkan skal ikki gerast størri. Loyvt er ikki at flyta veiðiloyvi frá fiskifari, ið er minni enn 15 tons, til fiskifar størri enn 15 tons ella øvugt. Heldur ikki er loyvt at flyta veiðiloyvi frá fiskifari, ið er minni enn 110 tons, til fiskifar størri enn 110 tons ella øvugt. | Tryggja, at høvuðsreglan um, at fiskiorkan ikki gerst størri, verður hildin. |
| Fiskidagar kunnu verða avhendaðir endaliga ella fyri eitt fiskiár í senn. | § 14 í lógini um vinnuligan fiskiskap<br>Kunngerð nr. 13 frá 25. februar 2005 um avhending av fiskidøgum, sum broytt við kunngerð nr. 76 frá 13. juni 2006. | Loyvt er ikki at avhenda fiskidagar, ætlaðir til húkaveiðu, til trolveiðu ella øvugt. Treyt er, at avhendarin sjálvur skal hava brúkt í minsta lagi 60% av tillutaðu døgunum, fiskiárið frammanundan. | Fiskiveiðieftirlitið skal hava fráboðan og góðkenna avhendingar av fiskidøgum. |
| Egin kvotupartur, egin árskvota og egin hjáveiðikvota kunnu verða avhendaðar. | § 14 í lógini um vinnuligan fiskiskap. | Treyt fyri avhending av íslandskvotu, ið ikki er endalig er, at í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotunum árið frammanundan eru nýttar til fiskiskap við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifarinum. | Fiskiveiðieftirlitið skal hava fráboðan og góðkenna avhendingar av kvotum. |
| Skip verða seld í vanligari sølu. | Hesi viðurskifti eru ikki beinleiðis regulerað í fiskivinnulóggávuni, men umsitingarlig siðvenja er at loyva, at fiskirættindini fylgja við søluni, tá skip verða seld. | | Veita tilsøgn um, at keyparin kann yvirtaka fiskirættindini, treytað av, at hann lýkur treytirnar fyri at eiga fiskifar undir føroyskum flaggi. |
| Skip verður selt á tvingsilssølu. | Hesi viðurskifti eru ikki beinleiðis regulerað í fiskivinnulóggávuni, men umsitingarlig siðvenja er at loyva, at fiskirættindini fylgja við søluni, tá skip verða seld. | | Veita tilsøgn um, at keyparin kann yvirtaka fiskirættindini, treytað av, at hann lýkur treytirnar fyri at eiga fiskifar undir føroyskum flaggi. |
| Feløg, ið eiga fiskifør, verða seld. | Hesi viðurskifti eru ikki regulerað í fiskivinnulóggávuni. | | Í sambandi við broytingar í eigaraviðurskiftum o.a. eftirkannar Fiskimálaráðið, um treytirnar í lógini eru loknar. |

Eftir verandi reglum kunnu veiðiloyvi umsetast upp á tveir mátar:

- Veiðiloyvi kann verða flutt frá einum fiskifari á eitt annað, sum er í flotanum frammanundan – t.e. samanlegging av loyvum. Loyvt er tó ikki at flyta veiðiloyvi millum høvuðsbólkarnar í fiskidagaskipanini.

- Veiðiloyvini hjá tveimum fiskiførum kunnu flytast á far við ongum veiðiloyvi. Í fiskidagaskipanini er tó ikki loyvt at flyta veiðiloyvi frá fiskifari, ið er minni enn 110 tons, til fiskifar størri enn 110 tons ella øvugt. Heldur ikki er loyvt at flyta veiðiloyvi frá fiskifari, ið er minni enn 15 tons, til fiskifar størri enn 15 tons ella øvugt. Veiðiloyvi/fiskiloyvi hjá fiskiførum undir 15 tons kunnu ikki leggjast saman.

Viðmerkingarnar til lógaruppskotið frá august 1998 um samanlegging av veiðiloyvum sigur, at ein at grundgevingunum fyri broytingunum er, at tað skal bera til at kasta rættindini saman í eitt fiskifar, fyri at hava betri vinnugrundarlag.[2]

Endamálið er sostatt at minka um flotan og at effektivisera raksturin hjá teimum eftirverandi. Búskaparliga sæð er effektivisering gagnlig, tá minni av tilfeingi - kapitali og arbeiðsmegi - verður brúkt til fiskimøguleikarnar.

Síðani miðskeiðis í 1990-árunum er talið av veiðiloyvum í føroyska flotanum av fiskiførum yvir 15 tons minkað við góðum 25 prosentum. Minkingin er í stóran mun ein avleiðing av, at veiðiloyvi eru løgd saman í flotanum, sum er undir fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi. Talva 2 vísir, at tað serliga er í bólki 4A, útróðarbátar millum 15 og 40 tons, og 4B, útróðarbátar yvir 40 tons, at talið av veiðiloyvum er minkað. Stóra minkingin var í tíðarskeiðinum 1998-2005, tá tað bar til at flyta veiðiloyvi millum høvuðsbólkarnar, og har serliga línuskip og størru útróðrarbátarnir keyptu fiskirættindi frá smærru útróðrarbátunum.

Hendan gongdin vísir, at skipanin við samanlegging av veiðiloyvum hevur verið búskaparliga gagnlig. Fiskiførini eru vorðin færri og kapasiteturin meiri tillagaður.

***Talva 2:* Tal av veiðiloyvum hjá fiskiførum størri enn 15 tons í fiskidagaskipanini 1995 og 2008, eftir bólki**

| | *1995* | *2008* |
|---|---|---|
| Bólkur 1, lemmatrolarar | 14 | 13 |
| Bólkur 2, partrolarar | 34 | 28 |
| Bólkur 3, línuskip* | 19 | 25 |
| Bólkur 4A, útróðrarbátar millum 15 – 40 tons | 50 | 22 |
| Bólkur 4B, Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu | 35 | 22 |
| Bólkur 4T, Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu | 19 | 17 |
| **Tilsamans** | **171** | **127** |

* Í 2005 varð gjørd ein umbólking, so at øll fiskifør yvir 110 tons, sum royna við línu, vórðu flokkað í bólk 3, og tey undir 110 tons vóru verandi í bólki 4. Hetta bar í sær, at seks línuskip vórðu flutt úr bólki 4B upp í bólk 3
Kelda: Fiskivinnustovan

[2] Sí løgtingsmál 3/1998).

## 4.3 Avhendingar av fiskidøgum

Eigarar av fiskiførum í høvuðsbólki 2, 3 og 4 kunnu sínámillum í høvuðsbólkinum avhenda fiskidagar fyri eitt fiskiár í senn ella endaliga. Tó er ikki loyvt at avhenda dagar, ætlaðir til húkaveiðu, til trolveiðu ella øvugt.

Loyvt er tó at avhenda fiskidagar millum høvuðsbólkarnar, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum, undantikið frá bólki 5. Fiskidagar í høvuðsbólki 4 ætlaðir til fiskiskap við húki kunnu ikki avhendast til fiskiskap við troli í bólki 4 – hvørki beinleiðis ella umvegis aðrar bólkar.

Talva 3 vísir, hvussu stórur prosentpartur av tillutaðu fiskidøgunum í hvørjum bólki sær eru avhendaðir fiskiárini 2000/01 til 2008/09. Tølini vísa, at í meðal eru um 10 prosent av tillutaðum døgum í bólkunum 2, 3, 4A, 4B og 4T avhendaðir um árið.

***Talva 3:* Avhending av fiskidøgum sum prosentpartur av tillutaðu fiskidøgunum fyri allar bólkar av fiskiførum fiskiárini 2000/01 til 2008/09.**

| | 00/01 | 01/02 | 02/03 | 03/04 | 04/05 | 05/06 | 06/07 | 07/08 | 08/09 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 2 | 8,9% | 11,2% | 6,9% | 13,6% | 5,9% | 11,6% | 5,5% | 4,9% | 20,1% | 9,8% |
| Bólkur 3 | 5,4% | 7,6% | 6,5% | 9,1% | 11,4% | 8,4% | 11,1% | 9,4% | 11,3% | 8,9% |
| Bólkur 4A | 9,0% | 17,4% | 11,2% | 43,1% | 24,4% | 5,7% | 3,9% | 9,5% | 6,1% | 14,5% |
| Bólkur 4B | 7,8% | 14,0% | 6,6% | 10,2% | 14,7% | 5,2% | 3,1% | 1,8% | 0,5% | 7,1% |
| Bólkur 4T * | | | | | | 5,3% | 7,0% | 7,6% | 22,5% | 10,6% |

* Í 2005 vórðu trolbátar í 4B eisini skipaðir í ein bólk fyri seg – bólkur 4T
Kelda: Fiskiveiðieftirlitið

Vert er at leggja merki til, at í fiskiárinum 2003/04 er lutfalsliga stórur partur av fiskidøgunum í bólki 4A avhendaður (43%). Hetta hevur m.a. samband við, at loyvishavarar hava vilja sloppið sær av við fiskidagar, áðrenn 60%-reglan kemur í gildi og skerjir møguleikarnar fyri at avhenda dagar í fiskiárinum 2004/05. Nýggja reglan ger, at tað ikki ber til at avhenda dagar, uttan at ein sjálvur hevur brúkt 60% av døgunum fiskiárið 2003/04.

Síðani fiskiárið 2005/06 er avhendingin av fiskidøgum í bólkunum 4A og 4B lutfalsliga lítil. 60%-reglan ger sítt. Men minkandi avhendingin í bólki 4B hevur eisini samanhang við, at í 2005 verður "110-tons skottið" sett í fyri at byrgja fyri, at rættindini hjá útróðrarflotanum endaðu á størri skipum[3] og ber m.a. í sær, at fiskidagar so at siga ikki kunnu flytast millum bólkarnar.

Samstundis, sum 110-tons-skottið varð sett í, verður gjørd ein umflokking, so at øll fiskifør yvir 110 tons, sum royna við línu, verða flokkað í bólk 3, og tey undir 110 tons verða verandi í bólki 4. Hetta ber í sær, at seks línuskip verða flutt úr bólki 4B upp í bólk 3. Hetta árið verða trolbátarnir í 4B eisini skipaðir í ein bólk fyri seg – bólkur 4T.

Hesar broytingar í skipanini hava samanumtikið gjørt sítt til, at avhending í serliga bólki 4B hevur verið minkandi, og er at kalla eingin seinastu fiskiárini.

[3] Løgtingsmál 88/2004, Ll.nr. 68 frá 23.05.2005.

Í fiskiárinum 2008/09 eru nógvar avhendingar í bólki 2 og bólki 4T. Hetta kemst av, at í hesum fiskiárinum eru fiskifør í hesum bólkum tikin úr vinnu, og dagarnir avhendaðir endaliga til onnur fiskifør í bólkinum.

Tað er torført at meta um, hvørja ávirkan umsetingin av fiskidøgum í sjálvum sær hevur havt á búskapin í vinnuni, ella um umsetingin hevur ført okkum nærri at málinum um, at fiskiskapurin skal vera búskaparliga burðardyggur.

Búskaparliga sæð hevur tað tó týdning, at skipanin er sett saman á ein hátt, sum eggjar til búskaparligan effektivitet og bygnaðartillagingar í flotanum.

Grundreglan eigur at vera, at avhendingar av fiskidøgum fara fram, tí eftirspurningur er eftir døgum, t.d. tí dagar hjá einstøkum skipi eru uppi, ella tí skipaeigari vil hava betri vinnugrundarlag.

Ein fyritreyt, fyri at keyp og søla av fiskidøgum skal hava tað tilætlaða búskaparliga árinið, er eisini, at tað er trot á fiskidøgum. Um hugt verður at skipanini undir einum, bendir einki á, at trot er á døgum. Einasti bólkur, ið tykist at hava havt veruligt trot á fiskidøgum, er bólkur 4T, trolbátar.

Sum er, verða fiskidagar ikki seldir og keyptir á einum opnum marknaði. Kappingin um dagarnar er avmarkað. Tí er prísurin neyvan so avgerandi fyri, hvør selur og hvør keypir. Um keyp og søla fór fram á einum opnum marknaði, so sigur búskaparfrøðin okkum, at keyparin vildi verið tann, sum rekur effektivasta fiskiskapin og hevur atgongd til fígging, meðan seljarin vildi verið ein, ið rekur minni effektivan fiskiskap. Hann selur, tí hann heldur seg fáa meira burturúr at selja sínar fiskidagar, enn sjálvur at brúka teir.

Harafturat vísir tað seg, at flestu avhendingarnar av fiskidøgum eru fyri eitt ár í senn. Tí eru avhendingarnar sum oftast at rokna sum stutttíðartillaging ella lán av fiskidøgum, og ikki so nógv ein liður í eini langtíðartillaging.

## 4.4 Avhendingar av eginkvotum

Eginkvotur og egnar hjáveiðikvotur kunnu avhendast í eitt ár í senn ella endaliga. Avhending av eginkvotum verður ikki skrásett á sama hátt sum avhending av fiskidøgum. Avhending ber í sær, at kvotur verða umbýttar, og við at kvotur vera handlaðar, og er mest vanlig í fiskiskapinum eftir uppsjóvarfiski og í ávísan mun eftir botnfiski í Barentshavinum og í Íslandi, umframt í rækjuveiðuni í Eysturgrønlandi og á Grand Bank (3L).

Einasta avmarkingin fyri avhending av kvotum er fyri botnfiskakvoturnar í Íslandi. Verður avhendað endaligt, er ikki nakað krav um, hvussu nógv skal vera nýtt, men fyri avhending, sum ikki er endalig, er kravið, at 60% av tillutaðu kvotunum eru nýttar fiskiárið frammanundan.

## 4.5 Søla av fiskiførum og eigaraskifti

Fiskirættindi kunnu eisini skifta hendur, tá fiskifør verða seld í vanligari sølu, á tvingsilssølu ella at felag, ið eigur fiskifar, skiftir eigaraskara. Í sambandi við vanliga sølu

og tvingsilssølu kemur tað eisini fyri, at fiskirættindi verða flutt av skipinum, áðrenn sjálvt skipið verður selt.

Lógin um vinnuligan fiskiskap hevur onga ítøkiliga áseting um, hvat skal henda við fiskirættindum, tá fiskifør verða seld ella felagið skiftir eigaraskara.

Veiðiloyvið er knýtt at ávísum fiskifari og givið hesum fiskifari. Fyrisitingarlig siðvenja hevur í nógv ár verið, at um keyparin lýkur krøvini, ið lógin annars setir fyri at eiga fiskifar undir føroyskum flaggi, so verður góðtikið, at fiskirættindi fylgja við søluni.

Hesi krøv snúgva seg um eigara- og avgerðarviðurskifti í feløgum, sum eiga fiskifør, hvussu stórur partur av kapitalinum kann vera á útlendskum hondum, umframt ásetingarnar um, hvussu stóran part av rættindum persónar kunnu hava ræðið yvir.

# 5. UMSETILIGHEITIN Í VERANDI SKIPAN – NAKRAR METINGAR

Føroyska lógarverkið loyvir ikki fríari umsetiligheit av fiskirættindum. Avmarkingarnar eru flestar í fiskiflotanum, ið er undir fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi. Fyri fiskirættindi aðrastaðni er umsetiligheitin rúmari og lógarásettu avmarkingarnar fáar.

Skipanir, har rætturin at fiska kann keypast og seljast, hava eitt búskaparligt endamál. Tær eru ætlaðar at birta undir bygnaðartillagingar í flotanum, tryggja búskaparliga burðardygga vinnu.

Tað er torført at meta um, um og hvussu umsetiligheitin hevur ávirkað búskapin í vinnuni. Ongar útgreiningar eru tøkar, sum leggja dent á at lýsa umseting av fiskirættindum og búskaparliga ávirkan av umsetingini. Fyri at staðfesta hetta, mugu djúptøknar kanningar gerast. Tað hevur ikki verið gjørligt innan fyri karmarnar fyri hesi verkætlan. Harafturat eru tað so nógv onnur viðurskifti enn umsetiligheitin í sjálvum sær, sum hava týdning fyri gongdina í flotanum – fyrst og fremst fiskiskapur og fiskaprísir.

Búskaparliga sæð hevur tað tó týdning, at karmarnir fyri umsetiligheit, ið myndugleikarnir geva vinnuni, eru settir saman á ein hátt, sum eggjar til bygnaðartillagingar og búskaparligan effektivitet.

Seinastu árini hava alsamt fleiri avmarkingar verið lagdar á møguleikarnar hjá fiskiførum, sum eru undir fiskidagaskipini í føroyskum sjógvi, at umseta veiðiloyvi og fiskidagar.

Mynd 1 vísir avmarkingarnar fyri avhending av fiskidøgum og samanlegging av veiðiloyvum í botnfiskiskapinum undir Føroyum. Myndin vísir, at fiskidagar ikki kunnu avhendast frá húki til trol og øvugt. Veiðiloyvi kunnu ikki leggjast saman millum fiskiiført yvir og undir 110 tons. Fiskidagar kunnu bert flytast tvørtur um 110 tons, tá tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum.

Nógvar av hesum avmarkingum í umsetiligheitini kunnu vera skilagóðar um ein leggur dent á onnur endamál í lógini um vinnuligan fiskiskap enn tey reint búskaparligu.

Tað kann til dømis vera gagnligt fyri stovnsrøktina, at lógin ikki loyvir avhending av fiskidøgum frá húki til trol og øvugt. Húkaflotin stendur vanliga fyri størsta partinum av veiðini av toski og hýsu, meðan partrolarar vanliga royna mest eftir upsa. Og so leingi ein ikki hevur fullgóða umrokning, sum avspeglar munin í veiðievnum og veiðisamanseting millum bólkarnar, er skilagott at hava hesa avmarking.

Avmarkingarnar í umsetiligheitini kunnu eisini vera skilagóðar, um ein leggur dent á samfelagsligu endamálini í lógini um vinnuligan fiskiskap, herundir at tryggja virksemi um alt landið. T.d. er útróðurin spjaddur um landið, og 110-tons-skottið í lógarverkinum forðar fyri, at útróðrarflotin verður keyptur upp av størra kapitalsterkara flotanum.

***Mynd 1:*** **Samanlegging av veiðiloyvum og avhending av fiskidøgum**




Búskaparliga sæð eru summar avmarkingar í umsetiligheitini tó óhepnar og forða fyri skynsamari tillaging í flotanum eftir marknaðartreytum. Tað er fyrst og fremst í botnfiskiskapinum undir Føroyum, at karmarnir fyri at handla fiskirættindi eru trongir. Nógvar forðingar eru fyri at fáa ein marknað fyri fiskirættindi at virka og tæna sínum

endamáli. Vantandi gjøgnumskygni í marknaðinum fyri fiskirættindi, sjálvt bólkabýtið og 60%-reglan eru dømi um lógarásetingar, sum forða umsetiligheitini.

Skulu skipanir við umsetiligum fiskirættindum verða eitt amboð at røkka málinum um, at fiskiveiðan skal geva størst møguligt búskaparligt avkast, er tørvur á at broyta reglurnar fyri flyting av veiðiloyvum og avhending av fiskidøgum.

# 6. UPPSKOT UM BROYTINGAR

## 6.1 Fyritreytirnar

Sambært setninginum fyri verkætlanina skal frágreiðingin meta, um tørvur er á at broyta verandi karmar fyri “umsetiligheit”, til tess at røkka yvirskipaðu endamálunum í lógini um vinnuligan fiskiskap og ætlanum landsstýrisins í samgonguskjalinum, og koma við ítøkiligum uppskotum um, hvussu hetta kann gerast.

Landsstýrið hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri, at ”*allar tilfeingisvinnur skulu vera lívfrøðiliga, fíggjarliga- og umhvørvisliga burðardyggar og geva størst møguligt búskaparligt avkast”.*

Búskaparliga sæð eru treytirnar fyri at fáa størst møguligt búskaparligt avkast úr vinnuni m.a. hesar:

- at fiskastovnarnir verða røktir og gagnnýttir á ein hátt, sum gevur størsta samfelagsbúskaparliga vinningin,
- at bygnaðarligu skipanirnar og reguleringarnar, sum landið setur í verk birta undir, at tilfeingið verður gagnnýtt á skilabestan hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga,
- at sjálvur fiskiskapurin fer fram á búskaparliga mest effektivan hátt.

Tey bæði fyrstu punktini hava myndugleikarnir ábyrgdina av. Løgtingið og landsstýrið seta karmarnar fyri, hvussu fiskiskapurin skal skipast, herundir fiskidagatal, reglur um friðað øki og friðingartíðir, fiskireiðskap, veiðihættir, minstamát o.a., umframt treytirnar fyri, hvussu umseting av fiskirættindum kann fara fram.

Triðja punktið skal vinnan taka sær av. Og ein av treytunum fyri, at vinnan er búskaparliga effektiv er, at myndugleikarnir geva vinnuni røttu karmarnar at virka undir, sum gera, at vinnan sjálv kann laga seg til skiftandi fyritreytir og umstøður.

## 6.2 Uppskot um broytingar

Hendan frágreiðing skal, sambært arbeiðssetninginum, lýsa umsetiligheit innanfyri karmarnar í verandi lógarverki og meta, um tørvur er á broytingum og koma við uppskotum um broytingar.

Samsvarandi hesum viðgerð frágreiðingin ikki grundleggjandi partar av skipanini ella hevur uppskot um broytingar, sum nema við sjálvan grundvøllin í føroysku fiskiveiðiskipanini, t.d. hvussu landið lutar fiskiveiðirættindi út, hvør kann sleppa framat o.a. Slík mál eiga at viðgerast í breiðari fiskivinnupolitiskum samanhangi. Spurningurin um umsetiligheit kann heldur ikki viðgerast leysur av øðrum skipanum í fiskiveiðuni ella fiskivinnupolitikkinum sum so.

Uppskotini í frágreiðingini um broytingar eru gjørd við støði í hesum og við denti á búskaparliga endamálinum í lógini og ætlanum landsstýrisins um, at fiskiveiðan skal geva størst møguligt búskaparligt avkast.

Skotið verður upp at gera hesar broytingar í lógarverkinum (í tilvildarligari røð)

- ***Endamálsorðingin í lógini broytast***
  Fiskiveiðipolitikkurin skal sambært lógini um vinnuligan fiskiskap ikki bert taka lívfrøðilig og búskaparlig atlit. Umsitingin av lógini skal eisini tryggja støðugar arbeiðsmøguleikar og virksemi um alt landið.

  Ivasamt er, um tað er rætt, at uppgávan hjá høvuðsvinnuni eisini er at skapa arbeiðspláss og spjaða virksemi um alt landið. Slíkar orðingar í lóggávuni eru í andsøgn við eina fría tillaging í flotanum og optimala gagnnýtslu av veiðiorkuni. Orðingin er ein forðing fyri at røkka stevnumiðnum í samgonguskjalinum um, at allar tilfeingisvinnur skulu geva størst møguligt búskaparligt avkast.

  **Endamálsorðingin í lógini**
  "Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið."
  *§ 2, stk.1 í lógini um vinnuligan fiskiskap*

  Nógvar av avmarkingunum í umsetiligheitini eru gjørdar fyri at varðveita arbeiðspláss og verandi bygnað í flotanum undir Føroyum. Men hesar avmarkingar forða samstundis fyri bygnaðartillagingum í flotanum á marknaðarbúskaparligum treytum.

  Tí verður skotið upp at strika ásetingarnar um, at umsitingin av lógini skal eisini tryggja støðugar arbeiðsmøguleikar og virksemi um alt landið.

- ***Endurskoða uppbýtið av fiskiførum 15 til 110 tons og taka 110-tons skottið burtur***
  Búskaparliga sæð læsir lógarásetta bólkabýtið í fiskidagaskipanini og avmarkingarnar í umsetiligheitini millum bólkarnar bygnaðin í flotanum og forðar fyri skynsamari og fríari tillaging. Bólkabýtið var kanska skilagott og hóskandi fyrst í 1990-unum, men nýtist ikki at vera tað í dag.

  Er málið, at fiskiskapurin undir Føroyum skal geva størst møguligt búskaparligt avkast, og umsetiligheitin skal vera amboðið, so verður mælt til at endurskoða bólkabýtið í dagaskipanini – serliga í húkaflotanum 15 til 110 tons. Harafturat verður skotið upp at taka 110-tons skottið burtur, so at møguleikarnir fyri at flyta veiðiloyvi og avhenda fiskidagar verður smidligari. Fiskiflotin eigur í størst møguligan mun át kunna tillaga seg eftir marknaðarbúskaparligum treytum.

- ***60 prosent reglan burtur***
  Í verandi skipan er treytin fyri at kunna umseta fiskidagar, at tú sjálvur hevur brúkt 60 prosent av tillutaðum fiskidøgum fiskiárið frammanundan. Endamálið við hesum er at forða fyri, at feløg ella einstaklingar fáa útskrivað fiskiloyvi ár um ár, bert fyri at avhenda fiskidagar til onnur.

60% reglan forðar í summum førum fyri, at vinnan kann tillaga seg á marknaðarbúskaparligum treytum.

Tí verður skotið upp, at 60% reglan verður strikað. Fyri framhaldandi at forða fyri, at feløg ella einstaklingar fáa útskrivað fiskiloyvi ár um ár, bert fyri at selja fiskidagar, verður samstundis mælt til, at ein brúksskylda verður løgd á sjálvt fiskiloyvið. Tað vil siga, at um loyvishavari sjálvur ikki hevur brúkt tillutaðar fiskidagar, ella ein nærri ásettan part av teimum í t.d. tvey ár, missir hann fiskiloyvið ella partar av fiskidagatalinum.

- ***Fiskiloyvi umsetilig***
  Verandi regluverk loyvir samanlegging av veiðiloyvum og avhending av egnum fiskidøgum og egnum kvotum. Skotið verður upp, at tað eisini skal bera til at avhenda fiskiloyvi, ið geva rætt til at fiska av felagskvotu, felags fiskidagar og fiskiloyvi til annan fiskiskap, sum ikki er reguleraður við kvotum og døgum.

  Mett verður, at hetta vil gera umsetiligheitina smidligari, og kann vera við til at skunda undir bygnaðartillagingar í flotanum.

- ***Krav um, at veiðiloyvi hjá fiskiførum í fiskidagaskipanini hevur dagar knýtt at sær, fyri at kunna umsetast***
  Í verandi lógarverki er einki krav um, at veiðiloyvi hjá fiskifari í fiskidagaskipanini undir Føroyum, ið skulu leggjast saman, hevur fiskiloyvi við fiskidøgum tengt at sær. Dømi eru um, at sonevnd "tóm veiðiloyvi" verða flutt, t.v.s. at allir dagar eru fluttir av skipinum, so tað bara hevur veiðiloyvið eftir.

  Skotið verður upp at seta í lógina, at kravið fyri at flyta veiðiloyvi hjá fiskiførum í fiskidagaskipanini er, at fiskiloyvi/fiskidagar er knýtt at veiðiloyvinum. Somuleiðis verður skotið upp, at tað í fiskidagaskipanini ikki skal bera til at hava fiskifar við "tómum veiðiloyvi". Tá skip verða tømd fyri fiskidagar, dettur veiðiloyvið eisini burtur.

- ***Eitt veiðiloyvi á tvey skip, trý veiðiloyvi á tvey skip og trý yvir á eitt***
  Eftir verandi reglum er loyvt at leggja tvey veiðiloyvi saman í eitt skip, ella í sambandi við útskifting av fiskifør at flyta í mesta lagi tvey veiðiloyvi yvir á skip við ongum veiðiloyvi.

  Til tess at gera skipanina smidligari og harvið skunda undir bygnaðartillagingar í flotanum, verður skotið upp, at tað skal bera til at klúgva eitt veiðiloyvi í fiskidagaskipanini, og at flyta fiskidagar yvir á tvey skip. Tá skip verða skift út, skal eisini vera loyvt at flyta trý veiðiloyvi yvir á tvey skip ella trý yvir á eitt skip.

  Í sambandi við slíkar flytingar er framvegis umráðandi at tryggja, at meginreglan um, at fiskiorkan ikki verður størri, verður hildin.

  Mett verður, at við rúmari møguleikum at kasta rættindini saman, verður vinnugrundarlagi betri og líkindini fyri skynsamari rakstri størri.